VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 9 stig.

Eli ger málingina sjálvur

LISTAFRAMSÝNING

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Í dag kl 15:30 letur Eli Smith upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Eli er ein av okkara kendu listarmonnum – men tað serliga við framsýningini hjá honum hesaferð er, at allir málningarnir eru málaðir við máling, hann sjálvur hevur gjørt.

– Eg hevði hoyrt um aðrar, sum hava roynt hetta, m. a. til steinprent. Ta einu ferðina, eg var í Suðuroy við Háskúlanum, var tað at ein av lærarunum spurdi meg, um tað ikki bar til at gera máling burtur úr royðugrótinum. Tað var hetta, sum gav mær íblásturin, sigur Eli Smith, sum tó leggur dent á, at hetta ikki er nakað hann sjálvur hevur uppfunnið.

Eli Smith, sum er útbúgvin radiomekanikari, slepti fyri nøkrum árum síðani hesi vinnu og fór at mála burturav. Tó hevur hann undirvíst á Føroya Fólkaháskúla í eitt ár, men hetta starvið – sum honum dámdi sera væl – hevur hann nú sagt frá sær, tí tað fór við ov nógvari tíð, ið hann heldur vil nýta til listina.

Eli Smith ger málingina burtur úr gróti, koli, leiri o.ø., hann finnur í náttúruni. Hann gongur nógv í haganum í hesum sambandi.

– Tað var efitr ein túr á Hósmøl í Nólsoy, at eg royndi hetta fyrstu ferð, og eg gjørdist so hugtikin av hesum, sigur Eli Smith.

Myndaevnið á framsýningini hesaferð eru landslagsmyndir og myndir av seyði – íblástur, Eli hevur fingið á túrum í fjøllunum.

Framsýningin, sum letur upp í dag kl 15:30 er opin til og við 16. mars. Allar dagar frá kl 15:30 til 20.

Til ferniseringina í dag spælir Nikolaos Kapnas á fiól – og kaffi verður at fáa.

Eli Smith við eini av myndunum á framsýningini. Seyður og náttúra eru myndaevnini, og flestu myndirnar málaðar við máling, hann sjálvur hevur gjørt úr royðugróti, koli og leiri
Mynd: Álvur Haraldsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷17
Nuuk	÷9
Qaqortoq	÷1
Ammassalik	2
Saint John's	÷4
Halifax	÷1
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	6
Lerwick	4
Aberdeen	4
London	4
Tromsø	3
Bergen	3
Oslo	–
Stokkhólm	1
Keypmannah.	1
Helsinki	÷4
Moskva	1
Berlin	1
Warzawa	4
Kiev	0
Bukarest	3
Paris	2
Madrid	13
Róm	10
Malorca	11
Athen	14
Malta	15
Tunis	18
Beijing	14
New Dehli	27
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	–
New York	5
Miami	19
Los Angeles	17
Meksikobýur	19
Panama	30
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 970 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga móti Hvarvinum og grynnist. Eitt hàtrýst, 1043 hPa. yvir Estlandi viknar.



Lágtrýstið vestan fyri Skotlandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum leygardagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/03 kl. 06⁰⁰– 11/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,4°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,7 mm – mált frá 10/03 kl. 06⁰⁰–11/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 15,1 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

6. mars: Fullmáni
12. mars: Mánin næstur jørðini
13. mars: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
12. mar	10.32	23.14	09.32	22.14	09.47	22.29	00.07	12.32	01.07	13.32	08.47	21.29	07.47	20.29	10.47	23.29	11.47	—	10.17	22.59	11.32	—
13. mar	11.56	—	10.56	23.40	11.11	23.55	01.14	13.56	02.14	14.56	10.11	22.55	09.11	21.55	—	12.11	00.29	13.11	11.41	—	00.14	12.56
14. mar	00.40	13.23	—	12.23	—	12.38	02.40	15.23	03.40	16.23	11.38	—	10.38	23.08	00.55	13.38	01.55	14.38	00.25	13.08	01.40	14.23
15. mar	01.53	14.22	00.53	13.22	01.08	13.37	03.53	16.22	04.53	17.22	00.08	12.37	11.37	—	02.08	14.37	03.08	15.37	01.38	14.07	02.53	15.22

5 707265 100050 >